# Umhvørvisvika í Tórshavnar kommunu




**Alla komandi viku er umhvørvið á breddanum hjá Tórshavnar kommunu**

UMHVØRVI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Umhvørvisvikan verður sett komandi mánamorgun klokkan 9 í spildurnýggja endurnýtsluhandlinum uppi á Hjalla. Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini, seta umhvørvisvikuna. Í sambandi við at endurnýtsluhandilin letur upp, sigur formaðurin í ALV, Jóhan Samuelsen, nøkur orð.

Evnið fyri umhvørvisvikuna hesaferð er CO2 utlát. Visjónin er, at allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu vera tilvitaðir um, hvørji árin CO2 hevur á umhvørvið. Endamálið er, at vit skulu minka um okkara egna CO2 útlát. Vit skulu hugsa globalt og handla lokalt.

- Vit hava lagt okkum eftir at fáa børnini og tey ungu við í umhvørvisvikuna. Eitt nú hava allir næmingar í 4. og 5. flokki í Tórshavnar kommunu fingið eina Grøna ummælisbók. Hugsanin við hesum er, at børnini skulu sleppa at fylgja við í, hvussu væl foreldrini ansa eftir umhvørvinum. Eisini gera nakrir fólkaskúlanæmingar stuttfilmar um umhvørvið. Á henda hátt fáa vit høvi at síggja, hvussu okkara ungu síggja umhvørvið, sigur Tórshavnar kommuna í tíðindaskrivi.

Í døgunum 5.-10. mai eru nógv spennandi tiltøk á skránni. Øll tiltøkini eru í miðbýnum. Eitt nú fara Meyla og klovnurin JoJo at koyra í bussleið 2 týsdagin frá klokkan 12 til 15. Teknikapping verður í Býarbókasavninum frá mánadegi til hósdag, umhvørvisverkstaður verður í Margarinfabrikkini somuleiðis mánadag til hósdag. SEV, Hiti og LM Veiting hava framsýning um orkusparing í Müllers pakkhúsi, har til ber at vinna spariperur. Fyrilestrar verða í Miðlahúsinum við Finnboga Joensen, Hákuni Djurhuus, Maritu Hentze, Kristionnu Rein og Jesper Theilgaard.

Leygardagurin 10. mai verður ein rættur familiudagur, har gongutúrar vera við býráðspolitikarum, Meyla og mótasýning í endursnið verður í Posthúskjallaranum og framsýningar verða í Müllers pakkhúsi og Býarbókasavninum. Nakrar broytingar eru í skránni, sum er komin í hvørt hús, tær kunnu síggjast á www.torshavn.fo, sigur Tórshavnar kommuna.



## Montørur til FT Samskifti

**Hevur tú tekniskt innlit bæði í tele- og datatøkni, og hevur tú áhuga fyri góðari kundarøkt? So er tað júst tær, vit leita eftir.**

**Søkt verður eftir montøri til Tænastudepilin á FT Samskifti í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt.**

Sum montørur hjá FT Samskifti verður tú ímyndin úteftir mótvegis okkara kundum. Tú fært ábyrgd av, at telefon- og internetútgerð, sum kundin hevur ognað sær, virkar. Montørarnir ráðgeva eisini kundunum í mun til ta útgerð og tær tænastur, ið kundin hevur keypt. Tú verður partur av okkara vælvirkandi montørtoymi og fært ein gerandisdag í einum spennandi arbeiðsumhvørvi, har avbjóðandi arbeiðsuppgávur eru, bæði sjálvstøðugt og saman við dugnaligum starvsfeløgum. Góðir møguleikar eru fyri at menna teg bæði persónliga og fakliga.

**Arbeiðsøkið fevnir um uppsetan, viðlíkahald og brekrætting av:**

- Internet, ISDN og ADSL
- Telefoninnleggingum
- Vekslarum
- Innanhýsis kaðalskipanum
- Terminalum av ymiskum slagi

**Vit ímynda okkum, at tann, ið settur verður:**

- Kann arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og dugir væl at samstarva og samskifta við viðskiftafólk
- Er útbúgvin elektronikkmekanikari, elektrikari, hevur líknandi útbúgving og/ella viðkomandi royndir

Arbeitt verður út frá høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Arbeitt verður í Tórshavn, Norðstreymoy, Vágum og Sandoy. Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Áhugað kunnu venda sær til Bjørn M. Mortensen, bólkaleiðara, ella Elisabeth Carlsson, depilsleiðara, á tel. 303030. Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. mai 2008 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

sansir.fo

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE